UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:
Nógvar uppsagnir

Danski fíggjarmálaráðharrin Thor Pedersen er neyvan væl umtóktur í danska toll- og skattaverkinum í hesum døgum.

Blaðið Børsen visti í gjár at siga úr einum loyniligum skjali í fíggjarmálaráðnum, at ráðharrin ætlar at krevja, at toll- og skattaverkið skal spara 15 prosent í lønarútreiðslunum tey næstu fýra árini.

Ein av leiðarunum í toll- og skattaverkinum segði við danska útvarpið í gjár, at verður ætlanin sett í verk, fara ein fjórðingar av teimum umleið 5500 starvsfólkunum at missa arbeiðið.

Risastríð

Heimsins størsta internet- og fjølmiðlafyritøka AOL Time Warner hevur lagt sak ímóti einari aðrari risastórari fyritøku, Microsoft.

Time Warner vil vera við, at Microsoft hevur misnýtt sín einkarrætt til at trýsta teirra egna Netscape úr av marknaðinum, og fyritøkan krevur sum vant í USA eitt risastórt endurgjald. Sambært sakførarunum hjá Time Warner er endurgjaldskravið gjørt upp til 12 milliardir dollarar.

Sakarmálið hjá Time Warner hevur í veruleikanum sama endamál sum tað sakarmálið, sum 19 amerikanskir statir løgdu ímóti Microsoft fyri fýra árum síðani. Tað málið endaðivið einari semju í vár. Í veruleikanum slapp Microsoft sera væl burtur úr málinum, og tað hevur havt við sær, at nakrir av teimum 19 statunum hava gjørt av at endurreisa málið. Málið kemur fyri í rættinum tann 11. mars.

So Bill Gates hevur nóg mikið at hugsa um í hesum døgum.

Bush vil hava 400 milliardir afturat til verjuna



Bush á fundi í felagsskapinum hjá heryvirmonnum, har hann boðaði frá eykaútreiðslum upp á 400 mia. krónur til verjuna
Mynd: Reuters

George W. Bush, forseti hevur biðið Kongressina um 400 milliardir krónur afturat til verjuna. So nógv eru amerikanska hernaðarútreiðslurnar ikki øktar seinastu 20 árini.

HERNAÐARÚTREIÐSLUR
Árni Joensen

Bush boðaði frá kravinum, tá hann í gjár helt røðu fyri heryvirmonnum. Hann segði, at pengarnir eru neyðugir til tess at tryggja, at USA kann vinna kríggið ímóti altjóða yvirgangi.

Forsetin segði, at USA hevur nútímans og væl virtkandi útgerð til at vinna eitt tílíkt kríggj, men hetta er útgerð, sum kostar nógvar pengar, segði hann.

Sambært forsetanum skulu tær umleið 400 milliardir krónurnar nýtast til hækkandi lønarútreiðslur, nýggj vápn, rakettverjuætlanina, ymisk ómannað hernaðarakfør og ymsa hátøkniliga herútgerð. Tekur Kongressin undir við uppskotinum, kemur fíggjarætlanin hjá amerikansku verjuni upp á einar 3200 milliardir krónur.

Týsdagin skal Bush halda røðu í Kongressini, har hann skal royna at fáa politikararnar at taka undir teimum raðfestingunum, sum forsetin og stjórnin hava lagt fram. Longu frammanundan er greitt, at landsins trygd stendur ógvuliga frammarlaga. Bush hevur m. a. nevnt, at stjórnin fer eisini at biðja um eykajáttan til at verju ta sivilu loftferðsluna, sambært veldisløgreglan FBI skal hava 300 rannsóknarfólk afturat, og fleiri hundrað fólk skulu setast afturat innan sjóverjuna.

Í røðuni fyri heryvirmonnunum segði forsetin, at hann ætlar sær at jagstra yvirgangsmenn, sama hvar teir royna at fjala seg.

Politisk gøla avdúkað í Týsklandi

Avdúkingin kann hava við sær, at royndirnar at banna nýnazistiska flokkinum fara fyri bakka

TÝSKUR POLITIKKUR
Árni Joensen

Týska stjórnin hevur sett sær fyri at seta nýnazistiska flokkinum NPD forboð fyri at virka, og málið hevur verið fyri í rættinum seinastu tíðina.

Men nú er komið fram undir avhoyringunum, at ein av teimum fremstu leiðarunum hjá nýnazistunum hevur havt tætt samstarv við týsku fregnartænastuna. Hetta kom fram, tá leiðarin var til avhoyringar í grundlógardómstólinum, og dómstólurin hevur nú gjørt av at útseta málið. Hetta kann bera í sær, at málið fer at liggja stilt í fleiri mánaðir, og tað kemur stjórnini illa við, nú val er í hondum.

Avdúkingin er serliga óheppin fyri innanríkisráðharran Otto Schilly. Hann hevur staðið á odda fyri royndini at steðga NPD, eftir at flokkurin fleiri ferðir er lagdur undir at hava skipað fyri harðskapi ímóti fólki av fremmandum uppruna.

Undir avhoyringini kom fram, at NPD-leiðarin hevur givið fregnartænastuni ymsar upplýsingar. Hetta hevur gjørt málið truplari at viðgera, og grundlógardómstólurin hevur tí biðið Otto Schilly um eina frágreiðing um sambandið millum NPD-leiðaran og fregnartænastuna.

Fleiri týsk bløð halda avdúkingina vera so álvarssama, at hon kann gera enda á royndini at banna nýnazistiska flokkinum. Blaðið Süddeutsche Zeitung skrivaði í gjár, at málið er endað sum ein gøla, sum kann geva fólki ta fatan, at viðgongdar kreftir í sjálvari stjórnini hava stýrt virkseminum hjá NPD.

Úr Norðurlondum:
Framvegis afturgongd

Norski Arbeiðaraflokkurin hevur framvegis ikki fingið fótafestið, vísir ein nýggj veljarakanning. Sambært kanningini hevði flokkurin fingið 20,8 prosent av atkvøðunum, var val nú, og tað er 3,4 prosentstig minni enn seinast. Parlamentariski leiðarin í flokkinum, Jens Stoltenberg, viðgongur, at tað vánaliga úrslitið er álvarssamt.

Sama kanning vísir, at tað framvegis gongur framá hjá stjórnarflokkinum Høgra. Kanningin gevur flokkinum 23,2 prosent ella ein framgongd upp á 2,6 prosentstig. Formaðurin, uttanríkisráðharrin Jan Petersen, heldur, at veljararnir munnu vera nøgdir við arbeiðið hjá stjórnini.

Nógvur skarvur

Danskir fiskimenn hava leingi kært seg um, at teir verða plágaðir av nógvum kópi og nógvum skarvi.

Bæði kópur og skarvur eru friðaðir í Danmark, men nú eru myndugleikarnir til reiðar at víkja frá friðingini. Stýrið, sum umsitur danska skóg og náttúru, hevur mælt til, at fiskimenninir fáa loyvi at skjóta skarv, og at tað eisini verður loyvt at oyðileggja skarvareiður. Í fjør taldu myndugleikarnir næstan 40.000 skarvareiður kring alt Danmark.

Hinvegin eru náttúrumyndugleikarnir ikki serliga hugaðir fyri at loyva monnum at skjóta kóp. Hildið verður, at umleið 11.000 kópar halda til í Danmark.

Fiskimenninir kæra seg um, at kópurin oyðileggur nógvan reiðskap, og at kópur etur nógvan fisk. Tí verður roknað við, at tað verður loyvt at skjóta nakrar kópar seinni í ár.

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 25. januar til hósdagin 31. januar

Aftur í Múla

Farna summar fluttu fólk aftur til útdeyðu bygdina Múla á Borðoynni.
Í fyrru sendingini úr Múla síggja vit, hvussu tað gongur, tá fólkini koma til bygdina. Tey skulu flyta inn í bygdini og fáa sínar fyrstu uppgávur.

Olja er eitt vítt begreb!

Bergur Rasmussen ummælir:

Henda seinasta miðlavikan hevur sum so mangar verið merkt av práti um olju. –

Oljan kann geva okkum loysingina innan fýra ár, helt fíggjarmálaráðharrin fyri, tá ið miðlamenn í grannalandinum fyri vestan spurdu hann um framtíðarútlitini. – Tað er óðamannaverk at siga so, helt løgmaður fyri. Og soleiðis fekk Útvarpið tilfar til fleiri tíðindasendingar á rað.

Hvussu er og ikki, so eru framtíðarútlitini hjá hesum landinum eitt afturvendandi evni í hvørjari Degi og viku og í útvarpinum við ikki at gloyma. Vit hava seinastu vikuna hoyrt upp í saman, at vit føroyingar eru millum heimsins mest dálkandi fólkasløg. Kanska amerikumenn dálka verri, men teir royna jú ikki at profilera sítt umhvørvi sum heimsins reinasta, og gerast Føroyar eitt veruligt oljuland, so verður orkunýtslan tvífaldað upp í eini 8 tons fyri hvønn íbúgva um árið! (Sigst) – Vit bora, og vit byggja, og vit fiska sum ongantíð fyrr, tað er sum danin á sinni segði: Her går det ufatteligt godt! – Og í sjónvarpinum nú týskvøldið segði ein ágrýtin SEV-verkfrøðingur frá, at nýggja virkið í Kollafirði fer at nýta upp til átta ferðir so nógvan streym sum øll Vágoygggin tilsamans! Vorðið sum!

Nei, so var tað hugaligari at hoyra gestakokkin hjá Gunnari Nolsøe herfyri, ið gjørdi ein vælsmakkandi fiskarætt, ið ikki skuldi liggja serliga tungt á, tí sum Miriomman segði, so fitnar tú ikki millum jól og nýggjár, men millum nýggjár og jól, og tí hevði Johanna á Tjaldraflötti gjørt av at venda flakinum fyri í olju. – Olja er eitt vítt begreb, segði hon, og okkum nýtist als ikki margarin, tá ið vit steikja. Tað var stak hugaligt at lurta eftir tykkum báðum hatta kvøldið úr Klaksvíkini.

Matsendingar tykjast annars vera sera væl umtóktar, tí Okkara Kokkur er fluttur í Okkara Køk og ger mat saman við nýggjum gesti hvørja ferð. Má tó viðganga at tað er heldur rárt hjá mær, at eg hyggi, men tað kemur fyri við hvørt, og hasin karry døgverðin sá sera leskiligur út.

Hinvegin var handan læknasendingin einki tespilig, so eg koyrdi útvarpið frá ístaðin. Har sat Marius gamli og kroysti søguna um Bør Børsson burturúr sær, tíverri kenni eg ikki ta søguna nóg væl og havi bert hoyrt hendinga partin, so eg fái ikki rættiliga úttalað meg um søguna, men tá ið hann letur lív í Ketil og Kálv og øll hini í Feðgum á Ferð, er tað kostiligt skemt.

Filmurin um niðurfrysta skræðugákin við teimum rotnu tonnunum og bubbupumpuni er helst eisini mettur at vera skemt. Men álvara tos! Filmurin var so fratbýttur, at hann næstan var skeg viðhvørt, tí tað var so út av lagið klikkað, at tú mátti smírast viðhvørt, og støk flenn komu eisini fram í sama anda. Sama kann sigast um filmin, tá ið teir grønu menninir lupu á, og allir teir kendu leikararnir blivu grillaðir av lásarakanónum. – Tað var tað, sum var so kul við filminum! segði ein tannáringur, eg prátaði við.

Ókey, tað var ein av hesum mongu Hollywood filmunum, sum einans ætla at undirhalda okkum eina løtu, tá ið vit kortini móð av degnum endiliga sita still eina løtu áðrenn niðurfaringartíð. Tað skal eisini vera pláss fyri teimum! Og vit eru hóast alt enn nøkur, ið hvørki hava parabolin vendan í ein sunnan, ella kaðal lagdan inn!

Fyri fimm og tjúgu árum síðan, tá ið tað millum ávís fólk var in at vera ikki-kommersiellur, varð eitt plátufelag sett á stovn, sum tónleikarnir áttu sjálvir. Í hesum sambandi høvdu loftmiðlarnir báðir viðtal við Kristian Blak, ið sum eingin annar hevur átt mergin í Tutl hesa fjórðingsøldina. Samrøðurnar vóru sera hugtakandi og áhugaverdar. Bert spell at innsløgini vóru so stutt, og at eingin tónleikur var í teimum! Nú skipaði Tutl fyri einari konsert, har ymiskir bólkar umboðandi hesi mongu árini framførdu.

Er tað tikið upp? Er tað sent? Um so er, kunnu tit vælsignaðu programleiðarar seta tað á skránna í einari endursending? Tað hevði í øllum føri frøtt meg.

Annars bert okkurt smátt aftrat úr miðlameldrinum hesar seinastu dagarnar. – Billboard bitarnir vóru suverenir hesa vikuna: American Woman, Bridge Over Troubled Water, Let It Be, The Long And Winding Road og My Sweet Lord í somu sending! Steikti tann, sum 1970 hevur verið eitt gott ár! — Hoyrdi annars Elis tosa um, at hesuferð í Hvat Nú fór hann at almannakunngera dansibands topp tíggju listan. Eg stúrsaði við, tá ið eg hoyrdi tað. Eru Fimtan ser bestu ikki einasti hittlistin longur? So noyðist Heðin Arge helst at lýsa aðrvísi næstuferð, og tó, talan er valla um sama málbólk!

Men soleiðis eru vit so ymisk, og rúm skal vera fyri øllum. – Frælsi fyri Loka eins og fyri Tór, segði Grundtvig gamli, og bæði SvF og ÚF royna eftir førimuni at røkka okkum øllum. Haldi eg.

Tilvera:
Um tær sjey deyðssyndirnar

Emily á Veðurgarðinum

Alle elsker Raymond

Jagten på Dr. Livingstone